NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Færøernes Mellem- og Realskole:

Realskúlaflokkur í 1964

Aftara rað f.v.: Gunnar Olsen (seinni Reynslág), Óli Breckmann, Heri Simonsen, Hermann í Stórustovu, Ingun Rubek-Nielsen (gift í Danmark), Óli Mortensen, Per Persson, Signar Niclasen, Bjarni Vilhelm og Helgi Øre. Fremra rað f.v.: Margreta Thomsen (gift Clementsen) Jóhanna Maria Samuelsen (gift Durhuus), Poul Eide, lærari, Jakobina á Dul (gift Vang) og Bergljót Sandoy (gift í Danmark).

Nú nærkast tíðin, tá framsýningin av millum- og realskúlanæmingum hjá Jórunn Dánjalsdóttir fer av bakkastokki um ólavsøkumundið. Framsýningin verður í Kommunuskúlanum í Havn og letur upp við eini kvøldsetu tann 23. juli kl. 19.00 har m.a. fyrrverandi næmingar koma at hugleiða um tíðina, tá tey gingu í skúla.

Annars sigur Jórunn, at henni vantar enn fleiri realskúlamyndir, serliga frá síðst í 50-unum og fyrst í 60-unum. Hóasttíðarfreistin til at koma við myndum er úti, vónar hon at fáa allar myndirnar til høldar.

Í dag hava vit eina mynd av teimum, sum fingu realskúlaprógv í 1964. Myndin er tikin tann dagin prógvið varð handað.

Adressan hjá Jórunn Dánialsdóttir er Sílagøta 3, FO-100 Tórshavn. Tel. 316024/226024 ella 0045 30697792. Myndirnar kunnu eisini latast inn "navnmerktar" í Wrangler Shop í N. Finsensgøtu 23 (tel. 314710).

Myndaeigari: Margreta Clementsen

Húsini við hondbóltsplenuna

Í sambandi við myndina vit høvdu í blaðnum av fimleikadegnum í Gundadali í 1959, hava vit fingið at vita meira um húsini á myndini..

Fremst á myndini, við hondbóltsvøllin, er felagshúsið hjá ítróttarfelagnum Kyndil, sum varð stovnað í 1957. Húsið var nýtt tá.

Aftan fyri sæst ein lágur betongbygningur frá krígsárunum (1940-45) – bygdur av eingilskmonnum. Í teimum húsunum búðu eina tíð kendu listafólkini Elinborg Lützen úr Klaksvík og Sámal Joensen Mikines úr Mykinesi.

Ovasta húsið er snikkaraverkstaðurin hjá Verlandi Johansen. Verland hevði havt snikkaraverkstaðin í einum kjallara í Sverrisgøtu (har sum matstovan Marco Polo er í dag), áðrenn hann flutti niðan á Háls.